Álit

í

løgtingsmáli nr. 27/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lov om en investeringsfond for Færøerne m.v. (Um støðuna hjá grunninum sum almennur grunnur, rentufrítt og avdráttarfrítt lán til P/F Vága Floghavn og P/F Suðuroyartunnilin o.a.)

Løgmaður, Aksel V. Johannesen, hevur lagt málið fram 22. oktober 2025, og eftir 1. viðgerð 4. november 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. og 18. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við stýrið fyri Íleggingargrunnin og løgmann, Aksel V. Johannesen.

Nevndin fegnast um, at Íleggingargrunnurin endiliga er komin á føroyskar hendur.

Ynskið hevur leingi verið, frá skiftandi landsstýrum, at Íleggingargrunnurin fyri Føroyar skuldi latast føroyskum myndugleikum.

Tað eydnaðist, tá danska stjórnin og Føroya landsstýri í januar 2024 gjørdu ætlanaryvirlýsing hesum viðvíkjandi. Tá bleiv lagt upp til, at lógin um íleggingargrunn fyri Føroyar bleiv broytt, soleiðis at grunnurin kundi avhendast.

1. januar 2025 bleiv Íleggingargrunnurin fyri Føroyar endaliga avhendaður til føroyskar myndugleikar. Síðan miðskeiðis í 70-unum, hava føroyingar umsitið Íleggingargrunnin við einum stýri, har føroyski landsmyndugleikin tilnevnir formannin/-kvinnuna og limirnar í nevndini og ásetir nærri reglur fyri raksturin av grunninum.

Endamálið við grunninum var fyrst og fremst at veita lán til íløgur í almenna undirstøðukervinum, ið myndaði neyðuga grundarlagið undir framhaldandi búskaparligu menningini í landinum, og í øðrum lagi eisini lán, sum beinleiðis kundu verða við til at útbyggja vinnulívið. Íløgurnar hava verið nógvar og gevandi fyri Føroya land. Grunnurin hevur verið, og er enn, væl rikin, og er fæið vaksið gjøgnum árini.

Við avhendanini fingu føroyskir myndugleikar fulla fíggjarliga ábyrgd av grunninum og ræðið á lóggávuvaldinum, og harvið málsræðið til at skipa øll viðurskifti grunsins og ognir grunsins frameftir - íroknað hvussu grunnurin verður skipaður, og hvussu peningurin í grunninum frameftir verður nýttur.

Hetta lógaruppskotið er ein beinleiðis avleiðing av, at grunnurin er komin á føroyskar hendur.

Ætlanin er, at grunnurin skal halda fram at vera sjálvstøðugur, almennur grunnur. Virksemi grunsins verður ikki tikið við á fíggjarlógina, men roknskapurin verður tikin við sum eksternur grunnur í landsroknskapinum. Hann fær tí ikki ávirkan á fíggjarlógina á sama hátt sum aðrir tílíkir grunnar. Tí verða gjørdar ávísar lógarbroytingar fyri at lógarfesta, hvussu grunnurin skal virka komandi árini.

Hetta lógaruppskotið gevur grunninum heimild til at veita P/F Vága Floghavn 10-ára rentu- og avdráttarfrí lán til útbygging av Vága Floghavn. Felagið kann íalt veita eitt ella fleiri lán á tilsamans 350 mió. kr. til Vága Floghavn.

Harumframt fær grunnurin heimild til at veita P/F Suðuroyartunlinum 30-ára rentu- og avdráttarfrí lán til ætlaða Suðuroyartunnilin. Felagið kann í alt veita eitt ella fleiri lán upp á tilsamans 350 mió. kr. til P/F Suðuroyartunnilin.

Sambært galdandi reglugerð fyri virksemið hjá grunninum hevur grunnurin ikki møguleika at veita rentu- og avdráttarfrí lán, men veitir lán við vanligum marknaðartreytum. Tí er neyðugt at fáa heimild til rentu- og avdráttarfrí lán við hesi løgtingslóg.

Lógaruppskotið mælir til at játta lán til tvær stórar verkætlanir, sum hava stóran týdning fyri tað føroyska samfelagið og sum hóska væl til tað virksemið, ið grunnurin annars hevur havt og sum er partur av upprunaendamálinum við grunninum.

P/F Vága Floghavn er at meta sum kritiskt infrakervi í Føroyum og hevur avgerandi týdning fyri okkara samband við útheimin, eins og flogvøllurin hevur avgerandi týdning fyri vaksandi ferða- og frálandavinnuna. Harafturat er flogvøllurin ein avgerandi liður í tilbúgvingini fyri Føroyar.

Breið politisk semja er millum flokkarnar í Løgtinginum um, at tíðin er búgvin til at taka eitt týðandi fet fram á leið, fyri at fremja Suðuroyartunnilin og gera okkurt munagott fyri at venda keðiligu gongdini í fólkatalinum í Suðuroynni. Suðuroyggin er tann einasta stóra oyggin, sum eftir er, ið ikki hevur fast samband, og verandi ferðasambandið er til tíðir sera óstøðugt.

Harumframt vísa øll tøl, at Suðuroyggin er í eini serstøðu, tá tað snýr seg um haldføristrupulleikar, sum bara gerst verri, um onki verður gjørt. Hóast fólkavøksturin hevur verið stórur samanlagt í Føroyum seinastu 10 árini, er fólkatalið minkað í Suðuroynni. Miðalinntøkan er lægst í Suðuroynni. Arbeiðsloysið hægri enn í restini av landinum, og serliga er talið av langtíðar arbeiðsleysum lutfalsliga hægri í Suðuroynni. Fyri at venda gongdini hevur Løgtingið gjørt av at arbeiða við at knýta Suðuroynna í meginøkið.

Við at veita rentu- og avdráttarfrí lán yvir eitt tíðarskeið fer hetta at spara P/F Vága Floghavn og P/F Suðuroyartunlinum fyri rentuútreiðslum og avdráttum upp á lán og harvið gera verkætlanirnar fíggjarliga sterkari.

Sambært upplýsingum frá grunninum hevði hann í august 2025 seks virkin lán á tilsamans 311 mió. kr., umframt tilsagnir um tvey lán á 142 mió. kr., harav tað eina, sum er 100 mió. kr., verður virkið í 2026. Eitt yvirlit yvir útlán og gjaldføri hjá grunninum, grundað á fyriliggjandi lán og tilsagnir, sæst í fylgiskjali 3 til uppskotið. Sambært yvirlitinum er gjaldførið hjá grunninum 426 mió. kr. í miðjum 2025 og fer fram til ársbyrjan 2036 at hækka til 744 mió. kr. Grundað á omanfyrinevndu fortreytir hevur grunnurin sostatt ikki rúm til at veita lán upp til 700 mió. kr. tey fyrstu 10 árini.

Tó ber til at selja verandi lán til aðrar fíggjarligar aktørar fyri at útvega gjaldføri, sum kann nýtast til útlán til P/F Vága Floghavn og P/F Suðuroyartunnilin. Í samband við sølu av lánum kann grunnurin verða fyri einum kurstapi, men hinvegin kann hann eisini fáa ein vinning.

Tað framgongur av viðmerkingunum til uppskotið, at stýrið fyri Íleggingargrunnin hevur latið inn viðmerkingar til lógaruppskotið. Stýrið heldur, at tað eigur at verða tilskilað, at stýrið ikki kann ábyrgjast eftir teimum vanligu reglunum fyri tapsváða í sambandi við nevndu lánini í lógaruppskotinum. Til hetta viðmerkir Løgmansskrivstovan, at hon metir, at um Løgtingið samtykkir hetta lógaruppskotið, so er eisini undirskilt, at grunnurin tekur á seg størri váða fyri tapum enn annars, og tí kann stýrið heldur ikki ábyrgjast eftir teimum vanligu reglunum í sambandi við hesi lán. Nevndin er samd í niðurstøðuni frá Løgmansskrivstovuni.

Tað verður lagt upp til, at grunnurin skal varðveitast, hóast hann verður fíggjarliga avmarkaður næstu árini. Men samfelagið heldur fram við at menna seg, eisini aftan á hesar verkætlanirnar. Tíðin vil vísa, hvussu framtíðin fer at síggja út.

Nevndin heitir á landsstýrið um at fylgja væl við og um neyðugt finna loysnir, sum líta frameftir og kunnu tryggja, at grunnurin einaferð aftur verður ein annar fíggingarmøguleiki hjá framtíðar verkætlanum, til frama fyri undirstøðukervið í føroyska samfelagnum.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 26. november 2025

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	